

*Mauritius er ein subtropisk oyggj, ið liggur í Indiska Havinum, 800 kilometrar eystan fyri Madagaskar. Hon er til støddar á leið sum Føroyar, 65 kilometrar long og 45 kilometrar breið, og har búgva umleið 1,2 milliónir fólk*

# Ferðin til Mauritius

*"God created Mauritius and then made a copy of it to create paradise"*

Mark Twain

FERÐAFRÁSØGN

*Gudny Langgård*

## Seinni partur

Eftir at hava fortalt eitt sindur um Mauritius í mínari fyrru grein, fari eg nú at greiða eitt sindur frá einum brúdleypi, ið eg var til, um hvussu jólini verða hildin í Mauritius, um nýggjárið, ið er av ógvuliga stórum týdningi fyri fólkið í Mauritius, og eisini um ymisk pláss, ið eg havi vitjað á oynni.

Lítla jólaaftan hevði eg møguleikan at verða við til eitt brúdleyp her í Mauritius. Hetta var eg sjálvandi glað fyri at kunna uppliva og takkaði fyri. Tíverri var tað eitt kristið brúdleyp, ið vit eru von við í Føroyum. Tað hevði verið eitt størri upplivilsi at verið við til eitt hindu ella muslimskt brúdleyp, ið vanliga vara einar 3 - 4 dagar. Tó var eg sjálvandi spent at síggja, hvussu alt gekk fyri seg og tað var eisini øðrvísi enn, hvat vit eru von við í Føroyum. Brúdleypið varð hildið í einari stórari høll, ið var pyntað við blómum og ballónum. Tað, sum undraði meg, tá ið vit komu inn, var mátin, ið stólarnir vóru stillaðir uppá. Í høllini var ein pallur, eitt dansigólv og síðani stóðu stólar á rað allan vegin aftur til endan av høllini. Hetta gav einum meira eina kenslu av at vera til eina konsert enn til eitt brúdleyp. Á pallinum var ein DJ, ið spældi ymiskan tónleik alt kvøldið. Tænarar gingu runt og bjóðaðu gestunum øl, whisky, saft og pinnamat. Eftir umleið 1-2 tímar blivu lítlir tallerkar givnir fólkunum og øll fingu eitt stykki av høsnarunga og ein bolla við laksi. Fólk vóru sjálvandi pyntað og máttu sita við matinum í føvninginum. Seinni kom brúðarkakan inn og ein røða bleiv hildin av systrini hjá brúðrini. Øll fólkini stillaðu seg rundan um brúðarparið. Champagna bleiv serverað fyri gestunum, og tað bleiv skálað fyri teimum. Restina av kvøldinum bleiv dansað, etið og drukkið, og longu eftir tveimum tímum byrjaðu fólk at fara heim. Klokkan 22.30 gekk leiðin heim, men mær er fortalt, at so leingi sum fólk eru til staðar verður matur serveraður og musikkur verður spældur.

## Jólini

Fyri fyrstu ferð tók eg ta avgerð at verða heimanifrá á jólum. Tíðin nærkaðist jólunum og enn var lítið og einki at síggja av jólapynti í Mauritius ella nakar jólatónleikur at hoyra. Hitin var nógvur og ringt var at koma í jólahýr. Sjálvt um meirilutin av fólkunum í Mauritius eru hinduarar, verða jólini hildin, men tó ikki í sama málistákki sum heima hjá okkum. Tá ið vit koma inn í jólamánaðin, byrja føroyingar so spakuliga at stákast til jóla, við reingerð, jólagávum, baking o.a. Í Mauritius er lítið og einki sták fyrr enn sjálvan jólaaftan — tá sær man fólk keypa jólagávur, gera innkeyp av mati og eisini pyntanin av húsunum verður bíðað við til jólaaftan. Handlarnir eru allir opnir til klokkan 21.00 jólaaftan og vanliga til klokkan 13.00 jóladag. Býirnir sjálvir verða ei heldur pyntaðir, men mær er fortalt, at tá ið Mauritius hoyrdi til Onglands, var tað meira jólaligt á oynni. Vit gjørdu av at fara í kirkju jólaaftan sum siður er heima hjá okkum, men gudstænastan í kirkjuni var frá kl. 21-23. Hetta var eitt sindur keðiligt tíðspunkt fyri okkum, tí at døgurðin skuldi verða klokkan 21. Í familjuni eta tey vanliga lambstjógv á jólum, saman við salati og dressingi. Hetta varð etið saman við góðum fronskum víni og síðani bleiv bíðað til eftir midnátt við at pakka jólagávurnar upp. Eftir hetta var tíð til kaffi og kaku og umleið klokkan 02.00 var songartíð. Jóladag fóru vit í kirkju kl. 10.00. Tað var ein katólsk kirkja og har vóru so nógv fólk, at nógv máttu standa uttanfyri í hitanum. Tíverri var lesturin á fronskum, so tað var rættuliga avmarkað, hvat ið eg skilti, og trupult var at fylga við songunum. Seinni jóladag komu nøkur í familjuni at vitja, og um kvøldið varð ein kinesiskur rættur serveraður fyri øllum. Hetta vóru avgjørt eini øðrvísi jól fyri meg, og tað var ikki sørt, at tankarnir vóru heima í Føroyum hjá familjuni og vinum teir dagarnar, men tó eri eg glað fyri at hava roynt at hildið jól á einari subtropiskari oyggj saman við einari hindu-familju.

## Nýggjárið

Fyri kinesarum er nýggjárið av ógvuliga stórum týdningi og hetta hevur smittað fólkini í Mauritius. Eingin dagur á árinum hevur so stóran týdning sum nýggjársdagur, og hesin dagur og nýggjársaftan skulu helst verða hildnir heima saman við fámiljuni. Kinesarar trúgva, at tá ið tey skjóta rakettur upp í



luftina, reka tey allar illar andar vekk frá teirra heimi fyri tað farna árið og fáa lukku í tí nýggja árinum. Tískil er siður at vera heima á midnátt. Hesin siður bleiv eisini hildin í okkara fámilju. Ein góður døgurði bleiv etin um kvøldið og síðani bleiv bíðað við spenningi til midnátt. Rakettur blivu fyrireikaðar og champagnan bleiv tikin fram. Ein hoyrdi rakettur allan dagin og sjálvandi eisini um kvøldið, men tá ið klokkan nærkaðist midnátt vaks mongdin og á midnátt vóru so nógvar rakettur, at ein hvørki kundi hoyra nakað vegna buldur av rakettunum ella síggja nakað vegna royk. Eftir midnátt bleiv champagnan skonkt og familjan byrjaði at ringja runt fyri at ynskja hvørjum øðrum eitt gott nýggjár. Fyri fólk á Mauritius er tað av stórum týdningi, at tey byrja tað nýggja árið við at biða og tískil fara tey kristnu í kirkju, hinduarar í teirra tempul, muslimar í teirra muskéir o.s.v., tíðliga um morgunin nýggjárdag, og síðani verður koyrt runt fyri at vitja familjuna.

## Parkin

Á Mauritius er nógv ymist at síggja. Í mínum steðgi reistu vit nógv runt og vitjaðu ymisk støð. Vestanfyri á oynni er ein stór park, ið eitur Casela. Har vóru vit ein dag. Í parkini eru nógv ymisk sløg av fuglum frá øllum heiminum at síggja, umframt fiskar, leyvur, apur og onnur dýr. Tíðin gekk skjótt og vit komu runt eftir umleið trimum tímum. Tá høvdu vit spákað spakuliga runt alla parkina, umframt at hava etið ein góðan bita í tí eksotisku matstovuni, ið er umringað av pálmum og fuglasongum. Ein annan dagin gjørdu vit av at fara suðureftir á oynni og har vitjaðu vit ta væl umtóktu krokodilluparkina. Innkomin verður ein móttikin av seks stórum krokodillum. Í parkini eru nógvar krokodillur at síggja, í ymiskum støddum, umframt onnur dýr, so sum fiskar, froskar, yvirvaksnar skildpaddur o.a. Skjaldbøkurnar eru sagdar at verða umleið 100 — 150 ár og tær eru ógvuliga sterkar. Óðansæð um ein vaksin persónur setti seg á tær, lótu tær ikki við seg koma, men gingu við somu ferð. Hesar skjaldbøkurnar eru einans á landi, men tað er eitt annað slag, ið er á sjónum og tær vóru friðaðar í 1990. Áðrenn vórðu tær jagstraðar og etnar og mær er fortalt, at tær smakka ógvuliga væl.

## Le Morne

Tann eina dagin fóru vit til eitt stað, ið verður kallað Le Morne. Tað er vestanfyri á oynni og er ótrúliga vakurt, við nógvum flottum hotellum og strondum, men tað er ikki júst hetta, ið fekk okkum til koma hagar. Le Morne er eitt týdningarmikið søguligt stað fyri fólkini á Mauritius. Í 1809, tá ið Mauritius hoyrdi til Frakland, vóru 7.194 hvít fólk, 7.366 fríir afrikanarar, og restin av fólkunum - 58.728 vóru trælir. Í 1840, eftir at onglendingar vunnu á Fraklandi, gjørdu teir trælirnar fríar, men áðrenn hetta bleiv fortalt fyri teimum, flýggjaðu nakrir. Trælirnar goymdu seg í umráðnum í Le Morne, og tá ið teir sóu, at eingilskir hermenn komu eftir teimum, flýggjaðu øll niðan á eitt høgt fjall og kastaðu seg oman. Teir vildu heldur taka lívið av sær, enn at verða noydd aftur til teirra harra — tíverri leitaðu hermenninir eftir trælunum, fyri at geva teimum tey góðu boðini um at tey vóru frí! Síðani hesa syrgiligu hending, er plássið kallað Le Morne, ið merkir sorgarleiki á fronskum.



*Rithøvundin Mark Twain segði, at: »God created Mauritius and then made a copy of it to create paradise«, ið fortelur okkum eitt sindur um vakurleikan á oynni. Sum sagt er hetta ein ógvuliga væl umtókt ferðamannaoyggj fyri tey ríku og kendu. Øll hotellini á oynni eru trístjørnað og meira*



*Meirilutin av fólkinum á oynni eru hinduarar — teir teljast 50% av fólkatalinum. Síðani eru tað kristin, ið eru umleið 30%, og muslimar, ið teljast umleið 17%*

## Urtagarðurin

Ein av teimum síðstu døgunum gekk leiðin norðureftir, har franskmenninir gjørdu ein flottan urtagarð í 1725 — Pamplemousses Botanical Gardens. Urtagarðurin verður í dag nógv vitjaður, bæði av ferðafólki og av teimum lokalu. Har eru fleiri túsund ymisk sløg av blomstrum og trøum at síggja. Trøini eru risa stór og hava nógv ymisk sløg av fruktum á teimum. Summi av trøunum eru søgd at vera frá upprunatíðuni hjá urtagarðinum og annars eru fleiri og fleiri blomstur og trø komin við tíðuni. Blomstrini og trøini verða innflutt úr øllum heiminum og plantað í urtagarðinum. Eisini eru áir við fiskum og onnur dýr at síggja í urtagarðinum. Hann er ógvuliga stórur og avgjørt verdur at vitja, serstakliga um ein hevur áhuga í blomstum og trøum.

## Ile aux Cerfs

Vit gjørdu nógvar aðrar túrar á oynni, men túrurin, ið mær dámdi best, var til eina oyggj, ið liggur eystanfyri Mauritius — Ile aux Cerfs. Túrurin kostaði einans 200 krónur og vardi frá klokkan 10 á morgni til klokkan 17 seinnapartin. Fyrst sigldu vit við einum báti runt umkring. Vit fóru millum annað til tann størsta fossin í Mauritius og sóu nøkur lokal kava niður í fossin. Eisini høvdu vit møguleikan at snorkla. Tað var eitt gott upplivilsi. Har vóru nógvir flottir fiskar at síggja við ymiskum litum og tíbetur var eingin hávur upp á lúr! Eftir hetta fingu vit okkurt gott til matna. Maturin varð grillaður umborð á bátinum og var høsnarungi, fiskur og hummari. Gjøgnum allan túrin bleiv sodavatn, vatn, øl, vín og rom serverað. Eftir ein góðan bita, fóru vit inn á Ile aux Cerfs. Ikki er møguleiki at búsetast á oynni, hon verður einans nýtt til vitjandi. Har er ótrúliga flott og friðarligt. Ikki so nógv fólk, nógvar vakrar strendur og nakrar matstovur. Ætlanir eru um at gera ein stóran golfvøll á oynni. Nógv av fólkunum á Mauritius eru ímóti hesum og tann endaliga avgerðin er ikki tikin enn. Eftir nakrar tímar á oynni, fóru vit aftur umborð á bátin og sigldu vælnøgd til Mauritius.

Samanumtikið eri eg ógvuliga væl nøgd við túrin til Mauritius. Har er ógvuliga vakurt og fólkini eru ótrúliga gestablíð og hjálpsom. Hitin er sjálvandi nógvur og tað kann gerast ringt at sova til tíðir, bæði vegna hita og eisini vegna moyggjabitar, ið stinga og virka ógvuliga glaðir fyri at fáa vitjan norðanifrá — men eisini hetta verður gloymt í øllum vakurleikanum á Mauritius.